6-mannafør, kvinnur:

## Jarnbardur er sær sjálvum líkur

**Eingin ivi tykist vera um, at tær fara at verða meistarar. Spurningurin er bara, um tað verður við fullum stigatali, og tað bendir alt í løtuni á, at tað fer at verða**

KAPPRÓÐUR
*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*

Mest sannførandi kappróðrarmanningin av øllum teimum 55, sum higartil í ár hava luttikið í FM kappingini, er kvinnumanningin umborð á Jarnbardi.

Á Norðoyastevnu vunnu tær, eftir at tær eina góða løtu høvdu kappast við Páll Fanga. Á Skálafjørðinum leygardagin var Páll Fangi aftur næstfremstur. Sammett við í Klaksvík, so var munurin leygardagin tann, at hesa ferð kappaðist Jarnbardur ikki við nakran um fremsta plássið, meðan Páll Fangi var í ikki so lítlari kapping um næstfremsta plássið.

Startspurturin var ikki meiri enn reiðiliga av, tá ið Jarnbardur stakk seg framum hinar bátarnar. Tá ið hálvt málið var rógvið, var Jarnbardur meiri enn eina hálva bátslongd frammanfyri hinar, og tá ið Jarnbardur fór um málið, var hann væl meiri enn leysur av teimum næstu.

Páll Fangi kappaðist við Lóm um annað plássið. Á málinum var Páll Fangi eina stóra hálva bátslongd frammanfyri Lóm. Nýggi Gongurólvur tóktist eina løtu hava hug at bjóða seg fram í kappingini um heiðursmerkini, men hann megnaði ikki at halda tørn. Á málinum var Gongurólvur dottin eitt sindur meiri enn eina bátslongd aftur um Lóm.

Soleiðis sum tað hevur tørnað út hesar báðu fyrstu ferðirnar, so tykist spurningurin nú vera, um nakar bátur í onkrari kapping fer at verða førur fyri at vinna á Jarnbardi. Um manningin verður tann sama alt summarið, sum hon hevur verið í tveimum teimum fyrstu kappingunum, so tykist eingin ivi at verða um, at tað verður Jarnbardur, sum aftur fer at fáa fatur á meistaraheitinum, sum tær seinast vunnu í 2002, og sum Gongurólvur í fjør slapp at læna. Og í løtuni bendir alt á, at tað verður við fullum stigatali.

6-mannafør, kvinnur

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Jarnbardur | 5:43:03 |
| 2 | Páll Fangi | 5:49:00 |
| 3 | Lómur | 5:51:16 |
| 4 | Gongurólvur | 5:55:14 |
| 5 | Sølmundur | 6:02:08 |
| 6 | Víkingur | 6:03:06 |
| 7 | Sundabáturin | 6:12:05 |



*Heldur ikki hesaferð megnaði nakar at taka Jarnbard, sum tykist hava beina kós móti FM-heitinum*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Næstan fýra tímar fóru til kappróðurin



*Tað tók nærum fýra tímar at avgreiða eystanstevnuróðurin. Ikki minst komst hetta av, at ein ørgrynna av óviðkomandi bátum støðugt var í nánd av róðrarøkinum*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Meiri enn veðrið og umstøðurnar kring róðurin vóru tað menniskjaligar orsøkir til, at róðrartíðin hesa ferð var tvífald so long, sum hon var á Eystanstevnuni fyri tveimum árum síðani**

FM-KAPPRÓÐUR
*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*

Eingin setur spurnartekin við sjálvan kappróðurin og vinnararnar á Eystanstevnuni leygardagin. Men róðrartíðin var so mikið long, at tað í hesum próvtøkutíðum ikki kann gevast annað próvtal enn tað, sum er undir dumpimarkinum.

Sambært skránni var kappróðurin ásettur at vera klokkan trý, soleiðis sum tað plagar at vera á øllum stevnum. Tá ið 10-mannaførini komu skúmandi framvið havnarlagnum í Runavík og út ímóti langa pirinum, har málstengurnar stóðu, var klokkan tíggju minuttir í sjey. Tað vil við øðrum orðum siga, at tey, sum vóru á havnarlagnum alla tíðina, hugdu og serliga bíðaðu í knappar fýra tímar. Sammett við fyri tveimum árum síðani, tá ið kappróðurin seinast var á Eystanstevnuni, var talan um meiri enn tvífalda tíð til kappróðurin.

Veðrið var gott leygardagin, men lotið spældi fyrireikarunum eitt puss. Tá ið tað var arbeitt við at leggja bátarnar, vísti tað seg torført at halda teimum við tí fjarstøðu til hvønn annan, sum skal til. Tí var neyðugt í fleiri førum at leggja bátarnar umaftur, og tað fór við nógvari tíð.

5-mannaførini við dreingjum vóru á fjørðinum og hitaðu upp klokkan hálgum trý. Klokkan var farin av hálvgum fýra, áðrenn startskotið dundi fyri teimum. Tá høvdu teir sitið heitir og síðani kaldir og næstan stirdir og bíða og bíða í meiri enn ein hálvan tíma. Í øllum øðrum ítróttarkappingum verður hetta roknað sum alt annað enn optimal fyrireikingartíð.

### Menniskjaligir veikleikar

Umframt lotið, sum var mótspælari hjá fyrireikarunum, so vóru tað menniskjalig mistøk og óvandni, sum vóru orsøk til, at tað tók so langa tíð at avgreiða kappróðurin, at 1. hálvleikur í hinum stóra ítróttartiltakinum var liðugur, áðrenn tey mest kappróðrarhugaðu fóru av havnvarlagnum. NSÍ og EBStreymur vóru á veg at hvíla seg eftir fyrra umfarið, tá ið 10-mannaførini komu á mál, og tey, sum høvdu áhuga fyri steypahandanini, høvdu ongan møguleika eisini at síggja fótbóltsdystin.

Ein orsøk til stóru seinkingina var fasti starturin. Orsaka av at hann ikki varð spentur soleiðis, sum ætlanin var, at hann skuldi verða spentur, brast hann, og tað bar seinkingar við sær.

Ein onnur og kanska tann størsta orsøkin til seinkingina var tann ørgrynna av óviðkomandi bátum, sum vóru á Skálafjørðinum. Ivaleyst vóru nógvir har, tí teir hildu og halda seg hava stóran áhuga fyri kappróðrinum. Men teir tæntu avgjørt ikki kappróðrinum og stevnufyrireikarunum. Kanska tað besta róðrarøkið í landinum varð broytt til alt annað enn besta økið, tá ið óviðkomandi bátar otaðu seg alt nærri og nærri sjálvum róðrarøkinum. Eina løtu var heilt galið, og høvuðsdómarin kendi seg noyddan at hótta við, at hann fór at gevast, um bátarnir ikki tóku seg aftur.

Tað eydnaðist at avgreiða allar kappingarnar. Men óviðkomandi bátarnir seinkaðu projektinum, og kappróðrarbátarnir komu í aldur, sum als ikki áttu at síggjast á Skálafjørðinum leygardagin.

Á umboðum fyri Róðrarsambandið skilja vit, at teir seinni í hesi vikuni fara at eftirviðgera tað, sum gekk fyri seg á Skálafjørðinum. Í tí sambandinum fara teir at fáa frágreiðingar frá stevnufyrireikarunum, sum royndu at skipa fyri vaktarhaldi, og frá høvuðsdómarunum.






*Aftur var talan um javnan róður, men aftur vórðu tað teir á Havnarbátinum, sum drógu longsta stráið*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

10-mannafør:

## Havnarmenn sita við langa endanum

**Hóast kappingin tykist tættari, enn hon ofta hevur verið, so benda úrslitini í tveimum teimum fyrstu kappingunum á, at tað fer at verða torført hjá hinum bátunum at gera nakað við Havnarbátin í FM kappingini**

KAPPRÓÐUR
*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*

Spell var tað, at eitt sindur av glansinum leygardagin skuldi fara av kappróðrinum, sum er meiri spennandi enn allir hinir. Áskoðarafjøldin á róðrarøkinum var farin at tynnast, og útvarpslurtararnir kring landið fingu ikki tað sama burturúr, sum teir plaga at fáa, tá ið 10-mannaførini rigga til, og tað verður bíðað eftir startskotinum.

Men millum bátsmanningarnar bilti einki. Allar seks manningarnar vóru klárar, og tað var lagt akkurát so mikið nógv fyri, sum tað plagar at vera, og sum tað eigur at vera. Á fyrra partinum av 2000 metra teininum gekk rættuliga javnt á. Tað var ongantíð leyst millum bátarnar, og munurin var millum lítil og eingin. Eina løtu hevði ein hug at stinga reingina framum hinar, og eina aðra løtu var tað ein annar.

Kappingin stóð við út eftir fjørðinum. Men á seinna partinum av róðrarteininum var kappingin ikki so stór um fremsta plássið. Havnarbáturin, sum vann á Norðoyastevnu, var aftur hesa ferðina drúgvastur. Tá ið bátarnir vóru farnir inn um túsund metra málið, hevði Havnarbáturin hug at fara eitt vet framum hinar. Reingin gjørdist til skutin, og skuturin gjørdist til eina hálva bátslongd. Eina løtu var Havnarbáturin leysur av hinum bátunum, men á málinum var munurin aftur minni.

Eysturoyingur, Nólsoyingur, Vestmenningur, Vágbingur og Hoyvíkingur vóru í stórari innanhýsis kapping. Hoyvíkingur endaði aftastur í Klaksvik. Á Skálafjørðinum tóktist tað sum um, at tað skuldi eydnast hjá hoyvíkingum at byrgja fyri, at tann søgan skuldi ikki endurtaka seg. Eina løtu á fyrsta teininum var Hoyvíkingur kanska fremstur, og hann var eina løtu millum teir fremstu. Men tá ið síðsta skotið varð latið av leygarkvøldið, var tað fyri Hoyvíkinginum, sum aftur hesa ferð var aftastur.

Munurin fram til hinar var kortini ikki størri enn so, enn at tað eigur at varðveita vónina í hoyvíkingum um, at teir nýtast ikki so at siga at halda pláss í teimum fimm kappingunum, sum eru fyri framman í hesum kappingarárinum. Hoyvíkingur var minni enn eina hálva bátslongd aftanfyri Vágbingin.

Í fjør vunnu fleiri, sum nú eru við til at manna Hoyvíkingin, nógv við Ørvi. Nú hava teir tvær ferðir roynt, hvussu tað kennist at enda aftastir. Í fjør vunnu teir, sum nú eru við til at manna Vágbingin, nógv við Smyrli. Nú hava teir tvær ferðir í hesum árinum roynt, hvussu tað kennist at kappast fyri at sleppa undan aftasta plássinum heldur enn at kappast um at vinna.

Sammett við á Norðoyastevnu var talan um stóra framgongd hjá Eysturoyingi. Eftir at Havnarbáturin eina løtu í miðróðrinum hevði verið leysur av hinum, eydnaðist tað Eysturoyinginum so at siga at fáa um endan. Eysturoyingur hevði gott og væl um stýrimannin á Havnarbátinum, tá ið bátarnir fóru um málið, og eina hálva bátslongd aftanfyri Eysturoyingin vóru Nólsoyingurin og Vestmenningurin mest sum stavn um stavn.

Leygardagin verður kappast á Sundalagsstevnuni í Hvalvík. Um tað aftur ta ferðina fer at eydnast hjá Havnarbátinum at vinna, og um tað aftur tað ferðina fer at verða soleiðis, at teir í næstu røð fara at býta um pláss soleiðis, sum teir higartil hava gjørt tað, so kann tað væl vera, at spenningurin um FM heitið ikki fer at verða serliga drúgvur.

Havnarbáturin var meistari í 2001. Tvey tey seinastu árini hevur Eysturoyingurin verið FM vinnari.

**10-mannafør**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Havnarbáturin | 9:43:20 |
| 2 | Eysturoyingur | 9:46:19 |
| 3 | Nólsoyingurin | 9:48:06 |
| 4 | Vestmenningur | 9:48:19 |
| 5 | Vágbingur | 9:50:17 |
| 6 | Hoyvíkingur | 9:51:01 |

8-mannafør:

## Argjabáturin økir um munin

**Kvívíkingur tók annað plássið frá Nevinum Reyða, men fjarstøðan millum Argjabátin og Kvívíkingin var tann sama á Skálafjørðinum, sum hon var í Klaksvík**

KAPPRÓÐUR
*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*

Eingin tykist at skula skala Argjabátin. Á Skálafjørðinum síðsta leygardag var hann meiri sannførandi vinnari, enn hann var í Klaksvík næstsíðsta leygardag.

Á Norðoyastevnu var Nevið Reyða næstfremst, og Kvívíkingur var nummar trý. Á Skálafjørðinum var Kvívíkingur nummar tvey, og Nevið Reyða var nummar trý. Men munurin frá Argjabátinum og til Kvívíking var tann sami í Runavík, sum hann var í Klaksvík. Ta ferðina vóru fimm sekund frá nummar eitt og til nummar trý. Hesa ferð vóru fimm sekund frá nummar eitt og til nummar tvey.

Í Klaksvík vóru trý sekund frá Argjabátinum og aftur til Nevið Reyða. Leygardagin vóru seks sekund frá Argjabátinum og aftur til Nevið Reyða, sum altso endaði á triðja plássinum.

Tað hevur verið tosað um, at Kvívíkingur fór væl seinni undir venjingarnar, enn teir umborð á Argjabátinum fóru, og at hetta kanska fór at hava við sær, at munurin millum Argjabátin og Kvívíkingin fór at minka, sum kappingin fór at eldast, og kvívíkingar fóru at koma í alt betri venjingarstøðu.

Tað er sjálvandi framvegis møguleiki fyri, at hetta skal fara at laga seg soleiðis. Men leygardagin var tað einki, sum boðaði frá, at Argjabáturin hesa ferð var minni sannførandi vinnari, enn hann var í fyrstu kappingini.

Argjabáturin stakk seg skjótt framum hinar. Munurin gjørdist størri, og á málinum var Argjabáturin meiri enn leysur av Kvívíkinginum.

Ørvur er mannaður av nýggjum, eftir at fleiri teirra, sum vóru við í fjør, nú eru farnir umborð á Hoyvíkingin. Ørvur hekk væl við í kappingini um triðja plássið. Men undan endaspurtinum gav hann seg, og Nevið Reyða var gott og væl leysur av Ørvi, tá ið bátarnir komu á mál. Knørrur endaði aftastur.

**8-mannafør**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Argjabáturin | 7:42:18 |
| 2 | Kvívíkingur | 7:47:15 |
| 3 | Nevið Reyða | 7:48:09 |
| 4 | Ørvur | 7:54:13 |
| 5 | Knørrur | 8:01:10 |




*Argjabáturin vann greiðan sigur í áttamannafarsróðrinum, og so var stóri dagurin á Argjum veruleiki*

*Mynd: Álvur Haraldsen*